Bólkur D:

# Portugal reyk

**Figo og felagir hansara hava longu pakkað kuffertini, meðan Suður Korea staðfesti regluna um, at vertstjóðirnar altíð standa seg væl**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Undan hesi HM-kappingini var tað ongan tíð komið fyri, at vertstjóðin varð sligin úr kappignini í innleiðandi umfarinum, men nógva staðni varð tó gitt, at antin Japan ella Suður Korea ikki fóru at liva upp til hetta.

Fríggjamorgunin staðfestu japana tó, at teir í øllum førum ikki ætlaðu sær nakran veg, og beint eftir døgurða staðfestu leikararnir hjá Suður Korea hagtølini, tá tað eisini eydnaðist teimum at vinna sín bólk.

### Enn ein favorittur

Leingi stóð tó nógv á hjá Japan, tí hóast Portugal tíðliga í dystinum fekk Joao Pinto riknan av vøllinum fyri eina svínska takling, so var Portugal alla tíðina væl við í dystinum, og teir høvdu so sanniliga eisini sínar møguleikar.

Tað gjørdist tó enn torførari hjá portugisunum, tá teir í seinna hálvleiki eisini fingu Beto riknan av vølli, og tað gekk eisini galið, tá Park Ji Sung eftir eitt framúrskarandi einmansavrik smekkaði bóltin millum beinini á Vitor Baia.

Portugal noktaði tó at geva skarvin yvir, og tvær reisur í seinastu minuttunum vóru teir heilt nær við at tryggja sær javnleikin, men har gjørdist tó einki, og eins og Frakland og Argentina máttu portugisararnir ásanna, at tað ikki altíð er nóg mikið at vera favorittur á pappírinum.

Portugisiska tapið viðførdi, at USA vann seg víðari úr bólkinum, hóast teir í einum sera undirhaldandi dysti taptu 3-1 fyri Pólandi. Longu eftir fýra minuttum hevði bólturin verið tríggjar ferðir í málinum, tó at málið hjá USA í hesum føri varð kolldømt.

Við sigrinum fekk Póland eina lítla uppreisn, men hetta munaði tó lítið í samlaðu úrtøkuni, og eins og hjá Portugal var tað eitt sera stórt vónbrot hjá Pólverjum, at teir somikið tíðliga máttu siga farvæl til HM-kappingina.

**Úrslit:**
**Póland-USA 3-1 (2-0)**
1-0: Emmanuel Olisadebe, 3
2-0: Pavel Kryszalowicz, 5
3-0: Marcin Zewlakow
3-1: LAndon Donovan, 82

**Suður Korea-Portugal 1-0 (0-0)**
1-0: Park Ji-Sung, 70

Bólkur H:

# Belgia stríddi seg víðari

**Japan vann seg fyri fyrstu ferð í søguni víðari, og Russland er nú úti úr kappingini**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Søguligu stríðsbondini millum Japan og Russland fornokta seg ikki, og tí er einki at siga til, at um góðu fótbóltsúrslitini hjá Japan kennast eyka fjálg, nú Russland ikki vann seg víðari úr bólki H.

Talan var annars um ein sera dramatiskan dyst, tá Russland og Belgia skuldu gera av, hvør av teimum skuldi vinna seg víðari úr bólkinum. Russland hevði nóg mikið við javnleiki til at tryggja sær sessin, men hetta eydnaðist teimum tó ikki.

Talan var tó um eina sera spennandi seinastu løtu, tí eftir at Russland tveir minuttir fyri leiklok hevði minkað munin til 3-2, tveittu teir alt fram í royndunum at fáa seinasta málið, og fleiri ferðir var tað eisini um reppið, at bólturin fór inn í belgiska málið, men »reyðu devlarnir« megnaðu tó at halda fast, og harvið ogna sær sessin í fjórðingsfinaluni, har Brasilia verður mótstøðuliðið.

Fremsta plássið í bólkinum ognaði Japan sær, eftir at teir eisini vunnu triðja dystin í bólkaspælinum.

Japan var alla tíðina greitt omaná móti Tunis, men leingi hildu afrikanararnir sera væl fatur í japansku álopsmonnnunum.

Tá Moishima beint eftir steðgin fekk lagt vertstjóðina á odda, loysnaði tó, og tað var ikki annað enn uppiborið, tá stóra stjørnan hjá Japan, Hidetoshi Nakata, staðfesti sigurin eitt korter fyri leiklok.

Við sigrinum hevur Japan fyri fyrstu ferð í søguni vunnið seg víðari í 1/8-finalurnar, har teir skulu møta Turkalandi. Og við spælinum, sum liðið hevur sýnt og stuðlinum frá áskoðarunum, er als ikki óhugsandi, at Japan í øllum førum fer at teljast millum tær 8 sterkastu fótbóltstjóðirnar í heiminum um eina knappa viku.

**Úrslit:**
**Belgia-Russland 3-2 (1-0)**
1-0: Johan Walem, 7
1-1: Vladimir Beschastnyk, 52
2-1: Wesley Sonck, 78
3-1: Marc Wilmots, 82
3-2: Dmitry Sychev, 88

**Japan-Tunis 2-0 (0-0)**
1-0: Hiroaki Morishima, 48
2-0: Hidetoshi Nakata, 75

# Danmark úti

**Dýrabar mistøk móti Onglandi viðførdu, at spenningur rættiliga tíðliga fór úr dystinum**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bæði í Danmark og Onglandi var spenningurin undan dystinum leygardagin ovurstórur.

Eisini her heima mundu nógvir hyggjarar havt sett seg væl til rættis í stólinum um døgurðaleitið leygardagin, men tað var tó rættiliga tíðliga, at spenningurin byrjaði at fara úr dystinum.

Fyrst mistók Thomas Sørensen seg, soleiðis at Rio Ferdinand kundi skrásetast fyri málið til 1-0, og tá ein ódakkaður Michael Owen nakað seinni slapp at økja, tóktist alt vera avgjørt.

Ringi dagurin hjá dønum varð staðfestur, tá eitt mistak frá Niclas Jensen viðførdi, at Beckham kundi spæla Emile Heskey leysan, og við trimum málum á muni í steðginum, var alt mest sum avgjørt.

Eftir dystin iðraðu danir seg um persónligu mistøkini, sum kostaðu so dýrt, og partvíst var tað eisini rætt, at teir í seinna hálvleiki høvdu bóltin nógv meira.

Men teir skaptu sjáldan nakrar veruligar málmøguleikar, og so kann tað sum so vera tað sama, um Ongland seinastu trý korterini einki skapti. Tað høvdu teir ikki fyri neyðini, og ístaðin kundi miðverjan staðfesta, at hon væl kann verða lykilin hjá Onglandi til eina sera góða endastøðu.

Torførasta forðingin í hesum verður ivaleyst kvartfinalan. Har skal Ongland hitta vinnaran av dystinum millum Brasilia og Belgia, men í Onglandi er eingin, sum tosar um Belgia. »Brasil next« er longu sett á dagsskránna, og fyri fótbóltselskarar mann hetta í øllum tykjast sum ein sera spennandi uppgerð.

**Danmark-Ongland 0-3 (0-3)**
0-1: Rio Ferdinand, 5
0-2: Michael Owen, 22
0-3: Emile Heskey, 44

# Týskarar vinna altíð

**Reglan hjá Gary Lineker varð staðfest, tá Oliver Neuville tveir minuttir fyri leiklok sendi Paraguay úr kappingini**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrsta av teium 8 1/8 finalunum varð leikt leygarmorgunin, og ikki óvæntað eydnaðist tað týskarum at vinna seg víðari, eftir at teir vunnu 1-0 á Paraguay.

Leingi varð Týskland tó hildið á pínubeinkinum, tí hóast greiða leikliga yvirvág, so eydnaðist teimum ikki at fáa bóltin framvið Chilavert í málinum hjá Paraguay fyrr enn tveir minuttir fyri leiklok.

Hóast skaðastøðan hjá Týsklandi bara tykist at versna, so tóktist hetta ongan tíð at órógva liðið, sigurin sum heild var fult uppiborin.

**Týskland-Paraguay 1-0 (0-0)**
1-0: Oliver Neuville, 88

# USA víðari

**Mánamorgunin byrjaði við enn einari lítlari sensatión í HM-høpi**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Púrasta óvæntað vann USA mánamorgunin 2-0 á Mexico USA legði seg tíðliga í dystinum á odda við einum máli frá Brian McBride, og tó at Mexico royndi at svara aftur, so eydnaðist hetta ongantíð.

Ístaðin var tað USA, sum í seinna hálvleiki kundi avgera, tá eitt vakurt kontraálop endaði við at Landon Donovan stútaði bóltin í netið.

Við sigrinum hevur USA sostatt vunnið seg fram til fjórðingsfinalurnar, har teir skulu spæla móti Týsklandi, so uttan iva mugu amerikumenn enn einaferð finna seg í, at teir ikki eru favorittar.

**Mexico-USA 0-2 (0-1)**
0-1 :Brian McBride, 8
0-2: Landon Donovan, 65



# Dýr brotsspørk

**Íraldn misnýtti eitt brotsspark í vanligu leiktíðini og trý í brotssparkskappingini, og so slapp Spania víðari í fjórðingsfinaluna**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at siga til, um írar í dag iðra seg um tapið fyri Spania.

Eftir at Spania hevði hevt yvirvág størsta partin av dystinum, og uppiborið var á odda við einum máli, hevði Írland nevnliga allar møguleikar at avgera dystin til egnan fyrimun.

Spanski venjarin, Camacho, hevði enntá verið so arrogantur, at hann í seinna hálvleiki hevði tikið bæði Raul og Morientes av vøllinum, fyri at spara teir til fjórðingsfinalurnar, og hetta kundi kostað teimum dýrt.

Írland sendi nógv fólk fram í royndunum at javna, og tvær ferðir kastaði hetta brotsspark av sær. Fyrru ferðina misnýtti Ian Herte tó royndina úr ellivu metrum, men tá Robbie Keana javnaði í evsta minutti av vanligu leiktíðini, gjørdist neyðugt við umdysti.

Hesin gav einki mál, og tí mátti farast til brotssparkskapping, og her gjørdits Iker Casillas stóra hetjan. Í vanligu leiktíðini hevði hann bjargað einum brotssparki, og í brotssparkskappingini tók hann tvey afturat, umframt at eitt fór á tvørstongina, og so gjørdi tað minni, at spaniólar tvær reisur á rað sendu við síðuna av málinum. Spania kom kortini millum tey átta seinastu.

**Spania-Írland 4-3 eftir brotsspørk. 1-1 (1-0) í vanligu leiktíðini**
1-0: Fernando Morientes, 8
1-1: Robbie Keane (br.), 90
1-2: Robbie Kene (br.), 120
2-2: Fernando Hierro (br.), 120
3-2: Ruben Baraja (br.), 120
3-3: Steve Finnan (br.), 120
4-3: Gaizka Mendieta (br.), 120

# Senegal millum tey 8 sterkastu

**Fyrsta HM-luttøkan hjá Senegal hevur verið ein stór positiv uppliving hjá tjóðini**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var fullkomuliga óvæntað, at Senegal yvirhøvur skuldi koma so langt sum at vinna seg víðari úr bólkaspælinum.

Sigurin í setunardystinum móti Fraklandi tóktist tó at seta okkurt ígongd, og síðani hevur at kalla bert gingið ein veg.

Sunnumorgunin spældu teir so 1/8-finalu móti Svøríki, og hóast svenskarar mundu metast sum lítlir favorittar at vinna dystin.

Hetta sá eisini út til at halda, tá Henrik Larsson legði Svøríki á odda, men so tók Senegal yvir, og fram til steðgin høvdu teir eitt støðugt trýst, sum tó bert kastaði eitt mál av sær.

Í seinna hálvleiki leikaði meira javnt á, og kanska hevði Svøríki eina lítla yvirvág. Tað eydnaðist tó ikki nøkrum parti at skora, og tí gjørdist talan um longda leiktíð.

Í hesari eydnaðist Henri Camara at skjóta sonevnda gylta málið, tá hann skoraði umvegis stólpan. Beint frammanunda hevði Svøriki annars havt eitt skot á stongina, so tað vóru teir so væl kendu smáu marginalarnir, sum sendu grannar okkara úr kappingini.

Svøríki-Senegal 1-2 eftir longda leiktíð. 1-1(1-1) í vanligu leiktíðini
1-0: Henrik Larsson, 11
1-1: Henri Camara, 37
1-2: Henri Camara, 104

# Stutt um HM

### Skjótasta málið

Hóast Pólendingar vóru vónbrotnir um, at teir longu nú eru sendir heim, so hava teir í øllum førum sett okkurt merki á kappingina.

Málið hjá Emmanuel Olisadebe móti USA var nevnliga tað skjótasta higartil í kappingini. Olisadebe skoraði eftir 2 minuttum og 44 sekundum, men hetta er tó langt ífrá skjótasta málið í HM-søguni. Tað varð skorað í 1962, tá kekkisi Valsav Masek eftir bert 15 sekundum skoraði móti Mexico. Næst skjótasta málið í HM-søguni kom 20 ár seinni, tá Bryan Robson eftir 27 sekundum legði Ongland á odda móti Fraklandi.

### Romantsev gevst

Russiski landsliðsvenjarin, Oleg Romantsev, boðaði eftir tapið fyri Belgia frá, at hann ikki longur hevur ábyrgdina av russiska liðnum.

Romantsev hevði undan kappingini boðað frá, at um Russland ikki vann seg víðari úr bólkaspælinum, tók hann avleiðingarnar av hesum.

### Treiskur fraklendingur

Franski landsliðsvenjarin, Roger Lemerre, er sjálvandi undir hørðum trýsti, eftir at Frakland ikki vann seg víðari í kappingini.

Lemerre sigur seg tó ongar ætlanir hava um at siga starvið frá sær, hóast franska avísin, L'Equipe, mikudagin boaðið frá, at venjarin fór at siga upp.

Framtíðin hjá Lemerre verður væntandi avgjørd á fundi hjá franska fótbóltssambandinum fyrst í juli mánaði.

### Eitt mál afturat til Ronaldo

Brasilski framherjin, Ronaldo, fekk friggjadagin enn eitt mál til HM-máltindin, hóast Brasilia ikki spældi hendan dagin. FIFA gjørdi á fundi av, at fyrsta málið hjá Brasilia móti Costa Rica, sum upprunaliga varð skrásett sum sjálvmál, kortini skal góðskrivast Ronaldo, sum sostatt hevur fýra mál higartil í HM-kappingini.

### Maradona bjóðar seg til

Eftir at Argentina, sum undan kappingini varð mett sum favorittur at vinna HM-heitið, varð sent heim longu eftir bólkaspælið, er ónøgdin um venjaran, Bielsa, sjálvandi stór heima í Argentina.

Nú hevur fyrrverandi stórleikarin hjá landinum, Diego Maradona, boðið sær til at hjálpa landsliðnum. Hesaferð sum venjari.

- Eg havi altíð sagt, at eg fegin vil verða landsliðsvenjari, uttan at eg skal hava eina krónu afturfyri, sigur Maradona, og hann er ikki í iva um, hvat skal broytast, um fótbóltssambandið tekur av tilboði hansara.

- Í dag hugsa leikararnir fyrst og fremst um, hvussu nógvan pening teir kunnu forvinna, heldur enn at hugsa um Argentina, sigur altso El Diego.

### Langt leikbann

Portugisiski álopsmaðurin, Joao Pinto, kann nú rokna við einum longum leikbanni. Hetta tí hann eftir at hava fingið reyða kortið í dystinum móti Suður Korea, slerdi argentinska dómaran, Angel Sanchez.

Eisini í EM fyri tveimum árum síðani vórðu portugisar harðligir móti dómaranum, eftir at teir taptu hálvfinaluna fyri Fraklandi, og tí er sjálvt portugisiska fótbóltssambandið samt við FIFA um, at hendingin hjá Joao Pinto skal revstast hart.

### Maldini setti met

Tá dysturin millum Italia og Mexico hósdagin varð blástur av, hevði Paolo Maldini sett eitt nýtt met í HM-høpi.

Dysturin móti Mexico var 22. dysturin á rað hjá Maldini, og hartil 22. dysturin, har italski verjuleikarin hevur leikt allar 90 minuttirnar. Undan hesum átti týski álopsmaðurin, Uwe Seeler, hetta metið.

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Ronaldo | Brasilia | 4 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Marc Wilmots | Belgia | 3 |
| Rivaldo | Brasilia | 3 |
| Robbie Keane | Írland | 3 |
| Christian Vieri | Italia | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Fernando Morientes | Spania | 3 |
| Raul González | Spania | 3 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 3 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Jared Borgetti | Mexico | 2 |
| Nelson Cuevas | Paraguay | 2 |
| Henri Camara | Senagal | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 2 |
| Brian McBride | USA | 2 |
| Landon Donovan | USA | 2 |

**Bólkur A**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 2 | 3 | 7 |
| 2 | Senegal | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 4 | 1 | 5 |
| 3 | Uruguay | 3 | 0 - 2 - 1 | 4 | 5 | -1 | 2 |
| 4 | Frakland | 3 | 0 - 1 - 2 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Bólkur B**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Spania | 3 | 3 - 0 - 0 | 9 | 4 | 5 | 9 |
| 2 | Paraguay | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 3 | Suður Afrika | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 4 | Slovenia | 3 | 0 - 0 - 3 | 2 | 7 | -5 | 0 |

**Bólkur C**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brasilia | 3 | 3 - 0 - 0 | 11 | 3 | 8 | 9 |
| 2 | Turkaland | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 3 | Costa Rica | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 6 | -1 | 4 |
| 4 | Kina | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

**Bólkur D**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Suður Korea | 3 | 2 - 1 - 0 | 4 | 1 | 3 | 7 |
| 2 | USA | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 6 | -1 | 4 |
| 3 | Portugal | 3 | 1 - 0 - 2 | 6 | 4 | 2 | 3 |
| 4 | Póland | 3 | 1 - 0 - 2 | 3 | 7 | -4 | 3 |

**Bólkur E**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 3 | 2 - 1 - 0 | 11 | 1 | 10 | 7 |
| 2 | Cameroon | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 2 | 3 | 5 |
| 3 | Írland | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 4 |
| 4 | Saudi Arabia | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 12 | -12 | 0 |

**Bólkur F**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Svøríki | 3 | 1 - 2 - 0 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 2 | Ongland | 3 | 1 - 2 - 0 | 2 | 1 | 1 | 5 |
| 3 | Argentina | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 4 | Nigeria | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 3 | -2 | 1 |

**Bólkur G**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mexico | 3 | 2 - 1 - 0 | 4 | 2 | 2 | 7 |
| 2 | Italia | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 3 | Kroatia | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 4 | Ecuador | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 4 | -2 | 3 |

**Bólkur H**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Japan | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 2 | 3 | 7 |
| 2 | Belgia | 3 | 1 - 2 - 0 | 6 | 4 | 2 | 5 |
| 3 | Russland | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 4 | 0 | 3 |
| 4 | Tunis | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 5 | -4 | 1 |